# Kvívíkar Skúli

**Søkir eftir lærara til skúlaárið 2003/2004**

Vegna avlopstímar, lækkað tímatal o.a. er eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar Skúla, skúlaárið 2003/2004 leyst at søkja, starvið er eitt **0,45 starv**.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið serliga kann undirvísa í tónleiki, svimjing/fimleik og annars øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar Skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7 árgang. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarahøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 - 27.4.

Meira fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, tlf. 421291 fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 23. mai 2003.

**Kvívíkar Skúlastýrið**
Att: Jan Andreasen
Postboks 15 • FO-340 Kvívík


**Rør & Blikk**

**RØR & BLIKKSMIÐUR**

Søkt verður eftir fólki við royndum innan HVS arbeiði.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn, tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo


# Hvalbiar skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2003/2004.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkum 18.1 – 27.4.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 27. mai 2003.

**Skúlastýrið fyri Hvalbiar skúla**
v/ Róin Schrøter
850 Hvalba

# Ullamóttøka

Vinnumálaráðið hevur fyri árið 2003 gjørt eina innsavningarskipan av ull.

Tí kunnu áhugað, einstaklingar, virkir og kommunur nú

**søkja um at stovna eina ullamóttøku**

Arbeiðið kemur at vera 2-3 mánaðar um árið at taka ímóti, viga, møguliga turka, góðskuflokka, avgreiða og goyma ull frá seyðaeigarum, og síðani at selja hana víðari til virkir og einstaklingar ella til úflutning.

Roknað verður við, at latið verður 4 kr./kg. fyri 1. floks ull íroknað stuðul.

Roknað verður við, at 3 ullamóttøkur verða í 2003, eina í meginøkinum, ein í Suðuroy og ein í Norðoyggjum.

Prísurin á góðskuflokkaðu ullini verður avráddur millum móttøkuna og keyparan, tí ætlanin er at ullamóttøkan skal virka á handilsligum grundarlagi.

Krøv til ullamóttøkurnar:
Hava egnaði høli og liggja væl fyri
Skulu vera MVG- og roknskaparskyldugar
Hava førleika, áhuga og vitan um handfaring av ull
Hava góð evni og vilja til at halda roknskap við keyp og sølu.

Umsóknarbløð og aðrar upplýsingar kunnu fáast frá:

**Alm. Royndir og Ráðgeving**
**Royndarstøðin**
FO-410 Kollafjørður
tlf. 479001 · faks 479030

Freistin at søkja er 26. mai.

**Frágreiðing:** Lagt verður upp til, at seyðaánarar fáa ábyrgd av at fáa ullina til høldar og verða stimbraðir til at taka ullina upp, so at virkir og onnur lættari fáa fatur á reinari, skildari, turkaðari og góðskuflokkaðari ull, sum kann verða virka víðari til lidna vøru.


**GSM telefonir**
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
**Tráðleysar**
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
**Til skip og bátar**
NMT 450 - VHF telefonir v.m.

**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045


# Hús til sølu



Sethúsaognin Dalagøta 17 verður lýst til sølu, um hóskandi boð fæst.

Grundøkið, matr. nr. 790 i, Tórshavn er 280 m² til støddar.

Húsini eru í tveimum hæddum, tey eru stoypt og klødd við eternit.
Samlaða búøkið er 147 m2.

Í miðhæddini eru gangur, baðiverilsi, kamar, stova, køkur, spískamar, hjallur og goymslurúm.

Í kjallaranum eru wc, baðiverilsi og gangur í gerð. Harafturat er lítið kamar, stova og fýrrúm.

Húsini liggja væl fyri í friðarligum umhvørvi nær miðbýnum.

Byggiár 1957.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
Tlf. 31 11 45
Att: Fríða Patursson, adv.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Sjúkrarøktarfrøðingur

Eitt avloysarastarv á sjúklingadeildini fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi við einari arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum er leyst at søkja frá 1. juni til 31. desember 2003.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 37 11 33 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum og autorisatión skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
Postrúm 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist 22. mai 2003.


www.sosialurin.fo


www.sosialurin.fo